

# og tónlistarligum dygdum



*Høgni Reistrup vísir bæði málsligar og tónlistarligar dygdir á Hugafar á ferð. Hann dansar hegnisliga við føroyska málinum og tekur lurtaran við í sín heimliga tónleikaheim*
*mynd: Sunva Eysturoy Lassen*




fløga við góðum tekstum og fangandi løgum.

## At hvíla við Høgna

Tað skal ikki vera nøkur loyna, at hesin ummælarin er follin ‘pladask’ fyri røddini hjá Høgna.

Høgni hevur eina hása og pena rødd, ið hann eisini hevur sera gott tamarhald á. Hann syngur reint og dugir væl at nýta hana dynamiskt, og fer man í smálutir, so hevur hann eisini eina sjarmerandi vibrato á endunum á teimum langu tónunum.

Á summum útgávum situr man mestsum og krympar tær, meðan sangarin í heilum friggjar við hálvtónum yvir og undir teimum, ið miðja verður eftir. Men við Høgna hvílir tú og nýtir tónleikin.

## Ungt skald

Tað eru allarhelst fleiri við mær, ið hava tveitt pennin frá sær eftir óteljandi miseydnaðar dansir við føroyska málinum. Ein hørð madamma at svinga við.

Men Høgni dugir væl at yrkja og megnar at skriva fjølbroytt og vakurt. *Friðsæla stund* er eitt dømi upp á hansara skaldsligu dygdir:

*Kom lat okkum finna*
*spírandi gøtur*
*Dáttliga heimurin bjóðar*
*tær várskrýddar løtur*
*Ein sjón so vøkur at løtan*
*hon verður til ár*
*Væna steðga so at tíðin*
*kann festa sær røtur*
*Friðsæla stund stimbra*
*lívsins lund*

At Høgni á so ungum aldri vísir slíkar dygdir innan skriving, kundi bent á, at unga ættarliðið hevur fingið sín Kára P. Sjálvandi er eitt sindur eftir enn, men tað er ikki óhugsandi, at um nøkur ár er Høgni ein av okkara mætastu yrkjarum.

## Riggar best niðri á jørðini

Millum sterku løgini á fløguni eru *Býurin við ánna*, *Hugafar á ferð* og *Tak meg við*. Øll trý eru rættiliga still løg, og tað eru nevniliga hesi, tey einklu og naknu løgini, ið rigga best. Tað organiska og inniliga ljóðið er fangað, og røddin hjá Høgna er í sentrum. Kassagittarin, ið ljóðar serstakligani væl gjøgnum alla fløguna, kemur til sín rætt.

Men tá ið gongd kemur í, og ljóðmyndin byrjar at fyllast, haltar eitt sindur. Sum til dømis í *Ei longur ein lítil genta*, sum er tað villasta lagið á fløguni og er eitt up-tempo popplag.

Roynt verður at fáa eitt stórt sound, men á ein ella annan hátt ljóðar tað tómt og ikki væl miksað. Kanska serliga trummuljóðið er tunt. Tað er sum um, at tað lítla og einkla ljóðið, ið riggar so væl í teimum stillu og friðarligu sangunum, ikki heilt slær til, tá ið gongd kemur í.

Samstundis livirteksturin, eftir mínum tykki, ikki upp til Høgnasa annars so frálíku yrkjan.

## Ein dýrgripur

Men talan er avgjørt um eina frálíka debutfløgu, ið Høgni kann vera sera stoltur av. Leiklutin sum skald og tónasmið megnar hann til fulnar, og eingin ivi er um, at vit hava fingið ein tónlistarligan og málsligan dýrgrip í Hugafar á ferð. Uttan iva millum bestu føroysku útgávurnar í ár.




*Heiðrik av Heygum prógvar enn einaferð við fløguhúsanum, at hann telist millum fremstu grafisku listafólkini í Føroyum*

## FAKTA

**Aktuelt:**
Í annaðkvøld, mikudagin tann 18. juli, verður útgávukonsert í Meiarínum kl. 20.30.

Við á konsertini vera Høgni Fagraberg, Rúni Mouritsen, Ísak Sambleben, , Finnur Jensen umframt tveir blásarar og tríggir strúkarar.

**Slóð:**
www.myspace.com/hognireistrup